

Mynd: Álvur Haraldsen

**(1-1) 1-1**

1-0: Jógvan Isaksen 9.
1-1: Ndende Adama Guéye 34.
Dómari: Eiler Rasmussen

**SMS TIL 3. HÁLVLEIK**

*KÍ uppbygging - hvussu nogv ár skulu teir byggja upp?*

**ÍF:** Jákup Mikkelsen – Leivur Joensen, Bartal Eliasen, Jógvan Isaksen, Áki Petersen - Kristoffur Jakobsen, Dánjal á Lakjuni, Bogi Reinert Petersen - Fritleif í Lambanum, Clayton Soares (Frank Poulsen, 88.), Arnhold Kristiansen (Bogi Løkin, 60.)

**KÍ:** Meinhardt Joensen – Jóhan Jacobsen, Jonas Flindt Rasmussen, Ísak Simonsen, Heðin á Lakjuni – Ndende Adama Guye, Henry Heinesen, Heðin Klakstein (Bárður J. Heinesen, 89.) – Rodrigo Silva (Álvur F. Christiansen, 70.), Páll A. Klettskarð, Hjalgrím Elttør

**(1-2) 2-2**

0-1: Aleksandrs Cekulajevs 17.
0-2: Kári Nielsen 38.
1-2: Philip Djordjevic 45.
2-2: Heðin Hansen 80.
Dómari: Páll Augustinussen

**SMS TIL 3. HÁLVLEIK**

*Frensarnir blotnaðu av regninum og kuldanum í Sarpugerði*

**Víkingur:** Geza Turi – Bárður Hansen, Súni Olsen, Erling Jacobsen, Hanus Jacobsen – Philip Djordjevic, Hallur Hansson, Sølvi Vatnhamar, Heðin Hansen (Magnus Jarnskor, 88.) – Andreas Lava Olsen (Ingi Sørensen, 74.), Finnur Justinussen

**AB:** Heðin Stenberg – Jónas Stenberg, Andreas B. Vágsheyg, Dmitrije Jankovic, Beinir Ellefsen – Jógvan Skeel Nolsøe, Hørður Mohr, Kári Nielsen, Jobin Drangastein (Mikkjal T. Hentze, 76.), Sandri Færø – Aleksandrs Cekulajevs (Gert Drangastein, 85.)

**(3-0) 3-1**

1-0: Christian H. Jacobsen 4.
2-0: Magnus H. Olsen 6.
3-0: Christian H. Jacobsen 43.
3-1: Jóhan Dávur Højgaard 54.
Dómari: Ransin N. Djurhuus

**SMS TIL 3. HÁLVLEIK**

*Um B68 flytur niður, so flyti eg eisini niður*

**NSÍ:** Andras Gango – Jónhard Frederiksberg, Jens Joensen, Pól Jóhannus Justinussen, Andy Olsen – Árni Frederiksberg (Michal Przybylski, 90.), Haraldur R. Højgaard, Magnus H. Olsen (Justinus R. Hansen, 58.), Jann Martin Mortensen –Klæmint A. Olsen, Christian Høgni Jacobsen (Meinhard Olsen, 67.)

**B68:** Hans Jørgensen – Niklas Poulsen, Oddur Á. Højgaard, Ovi Brim, Mads Rosenberg – Hákun Edmundsson, Evrard Blé, Jóhan Dávur Højgaard, Jann Ingi Petersen, André Olsen (Óli H. Olsen, 61.) – Jonleif Højgaard (Esmar P. Clementsen, 83.)

**(1-0) 2-0**

1-0: sjálvmál 35.
2-0: Lukasz Cieslewicz 89.
Dómari: Rúni Gaardbo

**SMS TIL 3. HÁLVLEIK**

*Um nakar skuldi ivast, so Skála vit framvegis í Hvítadali :)*

**B36:** Tórður Thomsen – Høgni Eysturoy, Hørður Askham, Andreas Eriksen, Alex Mellemgaard (Árni G. Nielsen, 90.) – Róaldur Jakobsen, Odmar Færø (Símun Joensen, 79.), Rógvi Poulsen – Hanus Thorleifsson (Rasmus Dan Sørensen, 31.), Adeshina Lawal, Rógvi Poulsen

**Skála:** Mark Rytin – Holgar Durhuus, Pætur Dam Jacobsen, Petur Pauli Mikkelsen, Teitur R. Joensen – Ólavur Mikkelsen, Edvin Jacobsen, Uni Jacobsen (Høgni Midjord, 46.), Andras Frederiksberg (Símun Petur Poulsen, 87.), Jákup Johansen (Alexandur Johansen, 79.) – Brian Jacobsen

**FJEPPARA SMS**



**John Andersen**
NSÍ-FJEPPARI

*Vit kunnu tíverri ikki gleðast um sigurin enn. Kærufreistin er 14 dagar... Annars stuttligt at síggja Pól Jóhannus spæla har sum hann EIGUR at spæla.. Koyr á NSÍ!!!!*

longri aftur á vøllin, enn tað var ætlanin. Mikukvøldið bíðar aftur ein dystur, og tað var týdningarmikið at sleppa burturúr grannauppgerðini uttan løstir. Chrstian Høgni Jacobsen fekk hesa ferð møguleikan millum teir fyrstu ellivu. Vit vita, hvør dugur er í honum, og hann livdi væl og virðiliga upp til álitið, sigur Trygvi Mortensen.

Tit vinna ímóti teimum niðastu og ikki ímóti hinum?

- Tað siga tølini. Serliga á heimavølli hava vit verið óhepnir og ikki havt marginalirnar við okkum ímóti teimum, sum eru hægri á støðutalvuni.

## Vingdurin argaði nógv

Í Fuglafirði endaði tað 1-1 millum ÍF og KÍ, sum harvið hevur vunnið sjey stig ímóti fuglfirðingum.

**FJEPPARA SMS**



**Birgir Petersen**
ÍF-FJEPPARI

*Dysturin var sum vindurin blásti, onki skil á spælinum, man kundi sagt at hvørgin "tordi" at vinna dystin. Um vit fáa meir karantenur/skaðar, so fái eg sikkurt dystarboð áðrenn man veit av;)*

Á ÍF liðnum vóru fleiri broytingar orsaka av skaðum, men teir, sum hesa ferð fingu møguleikan, vístu saman við liðfeløgunum góðan hugburð.

Eftir hornaspark og nakrar ferðir aftur og fram var tað miðverjin Jógvan Isaksen, sum er uppvaksin í KÍ, sum setti bóltin í málið. Eftir langt innkast javnaði Ndende við stútara, og í 2. hálvleiki var tað órudduligt og fáir møguleikar:

- Eg haldi, at vit vóru vandamiklari í opnum spæli, og at teir vóru vandamiklari í deyðbóltsstøðum. Stutt frammanundan, at vit skoraðu, høvdu teir bóltin á tvørtrænum. Fram ímóti dystarenda høvdu bæði eg og innskifti Bogi Løkin góðar møguleikar at avgera okkum til fyrimunar, men tá ið alt kom til alt, so var 1-1 á góðari leið. Tað eru fimm stig fram til fjórða plássið, og vitrokna framvegis við tí møguleikanum, er viðmerkingin hjá Dánjali á Lakjuni, sum hesa ferð var framrættaður miðvallari.

KÍ miðverjin Jonas Flindt Rasmussen ásannar, at hetta hevði ikki verið besta fótbóltsspælið, sum hann hevur verið við til:

- Vøllurin í Fuglafirði er altíð torførur at spæla á. Síðuvindurin bar við sær, at tað var uppaftur torførari. Seinastu ferðirnar hava vit megnað at hildið tørn í verjupartinum. Vit mugu bara



**FJEPPARA SMS**



**Jógvan Johannesen**
B68-FJEPPARI

*Ófatuliga ólíkir hálvleikir. Fyrri var ein rein gávubutik frá okkara síðu. Seinna domineraðu vit totalt, men skulu vit vinna dystir mugu vit skora uppá allar teir 100% møguleikarnar vit fáa, men tað kemur mikukvøldið móti EB/Streymi.*

staðfesta, at tað gongur ikki so væl við at fáa úrtøku burturúr møguleikunum, so tað mugu vit arbeiða við. Vit rokna framvegis við møguleikanum at røkka plássi í europeisku kappingini næsta ár. Um tað skal eydnast, so mugu vit vinna. Nú hava vit spælt fimm ferðir uttan at fáa fult, so tað mugu vit broyta, staðfestir Jonas Flindt Rasmussen.